LM-031/2020

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið - Trivnaðarnevndin
Tinghúsvegur 1- 3
110 Tórshavn

23. oktober 2020
Mál: 20/00733-21
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Heri Petersen

Viðv. løgtingsmáli nr. 31/2020 – uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

Sbrt. skiftisregluni í § 2, stk. 2 verður mest loyvda lønarískoyti ásett til 19.900 kr. Soleiðis sum ásetingin er orðað, fevnir hon eisini um vard støvr. At ásetingin í § 2, stk. 2 eisini skal fevna um vard støvr, hevur ikki verið ætlanin og er heldur ikki viðgjørt í almennu- ella serligu viðmerkingunum.

Skipanin við tillagaðum støvrum, sum kom í gildi í 2013, loysti av vard støvr, men tey, sum tá vóru í vardum starvi, kundu halda halda fram við óbroyttum treytum. Enn eru umleið 50 persónar í vardum starvi. Um so er, at ásetingin um 19.900 kr. eisini fer at fevna um vard støvr, eru einstakir persónar, sum fara at missa meira enn 2.100 kr. um mánaðin.

Vit mæla til, at ásetingin í § 2, stk. 2 verður broytt soleiðis, at 2. pkt einans verður galdandi fyri tillagað støvr. Tað kann evt. gerast við at áseta, at "*Tó verður áseting og eftirlit í sambandi við tillagað starv framt eftir ásetingunum í § 23, stk. 2 og 3, og lønarískoytið kann ikki vera hægri enn 19.900 kr. um mánaðin.*"

Vinarliga

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýriskvinna

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo